# Føroyingar dømdu í Noreg

Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen sluppu at verða dómarar í einum sera spennandi dysti í Elverum, sum liggur á norska eysturlandinum. Dysturin millum Elverum og franska liðið, Creteil endaði við einum ógvuliga teprum sigri til norska liðið. Elverum vann 27-26. Hálvleiksstøðan varð 15-13 til Elverum. Í síðstu løtu - tá støðan varð 27-26 til Elverum - dømdu Andrias og Eyðun brotskast til franska liðið. Benoit Henry fekk ein gyltan møguleika at javna, men hann skeyt upp um málið hjá Elverum. Í lokalu fjølmiðlunum er ikki eitt orð at lesa um dómaraavrikið, men plagar tað ofta at boða frá góðum.



# Claus tapti grannadyst

Blackpool spældi um vikuskiftið grannadyst ímóti Preston, og tað endaði við tapi hjá Blackpool. Úrslitið av dystinum gjørdist 3-1 til gestirnar úr Preston. Claus Bech Jørgensen spældi við á liðnum hjá Blackpool allar 90 minuttirnar. Blackpool byrjaði væl og legði seg á odda 1-0 eftir 10 minuttir. Í seinna hálvleiki skoraði Preston trý mál og vann dystin ruddiliga.

KÍF-H71 20-23 (12-11):

# KÍF trýsti H71

**Hóast Damir Oros sat uttanfyri, so var um reppið, at hoyvíkingar vórðu sendir heim við ongum, tá teir vitjaðu hjá KÍF**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Í longum løtum av dystinum vóru tað kollfirðingar, sum vóru omaná, men tað eydnaðist tó hoyvíkingum at fara avstað við øllum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað tók sína tíð hjá KÍF, sum ikki kom á talvuna, fyrr enn teir fyri viku síðani bastu Kyndli. Men tað var nú nær við, at stigatalið varð økt longu sunnudagin, tá H71 vitjaði.

Við Damir Oros á beinkinum vóru kollfirðingar annars skerdir undan dystinum, men tað løgdu spælararnir nú ikki so øgiliga nógv í. Eitt nú tí ársins spælari í jústlidnu fótbóltslandskappingini – Arnbjørn T. Hansen – nú aftur er til reiðar at taka nøkur tørn á hondbóltsvøllinum.

Fyri setøgin var tað soleiðis KÍF, sum hevði betra takið, meðan H71 hinvegin als ikki fekk gongd á sítt spæl.

Fyrsta korterið eftir steðgin vísti seg tó at verða avgerandi. KÍF steðgaði mest sum púrasta upp, tá gestirnir veruliga fingu verjuna upp at koyra, og so kundu hoyvíkingarnir toga seg nøkur mál framum.

Við sigrinum heldur H71 fast í trýstinum móti oddinum, har teir kappast við Neistin og StÍF í royndunum at elta VÍF. KÍF tykist hinvegin ikki hava styrkina, sum skal til fyri at røkka eins og teir so ofta hava gjørt tað fyrr, so prógvaðu teir aftur hesaferð, at nakran lættan er talan sjáldan um hjá mótstøðuni, hóast stigatalvan boðar frá stórum muni.

## FAKTA um dystin

**KÍF-H71 20-23 (12-11)**
**10 min:** 4-4
**20 min:** 9-7
**40 min:** 14-15
**50 min:** 16-19
**Málskjúttar**
**KÍF:** Arnbjørn Hansen 8, Andreas Nielsen 3, Rógvi Weihe 3, Regin Petersen 2, Niclas Reginsson 2, Jákup Trúgvason 1, Ási Dam 1
**H71:** Regin Jensen 5, Janus Sørensen 4, Halgir Dahl Olesen 4(2), Esbern Patursson 3, Danni Syhler 3, Dánjal Tórgarð 3, Poul Kjartan Dam 1
**Brotskøst:** H71 3
**Útvísingar:** KÍF 5, H71 2
**Dómarar:** Kristjan Joensen & Karstin Joensen

# Setið stór mál

**Ætlanin er mest sum ræðandi stór, men ofta eru tað júst slíkar, sum gera munin**

ÍTRÓTTARKLUMMA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



Tað er ikki smávegis ætlan, sum Todi Jónsson saman við øðrum føroyskum íleggjarum barslar við á Amager.

Eitt stadion fyri tvær milliardir fær helst ætlaða tjóðarvøllin hjá FSF at síggja út sum tunn lummaull, men tað hoyrir eisini við til fortreytirnar, at fortreytirnar fyri at skapa eitt nøktandi fíggjarligt grundarlag til slíka ætlan eru nakað væl betri í danska enn føroyska høvuðsstaðnum.

Og partvíst ber eisini til at skapa hesar fortreytir sjálvur.

Við at seta sær sum mál, at Keypmannahavn skal vera norðurlendski høvuðsstaðurin, tá um ræður rimmar mentunar- og ítróttatiltøk, er tvørtræið longu lyft nakað nógv hægri, enn tey flestu hava roynt áður. Men tað er nú ikki nakað, sum menninir handan ætlanina ikki hava roynt áður.

Brian Mollerup, ið er settur sum høvuðsmaðurin í ætlanini, hevur áður sett sær mál, sum fyri øðrum tykjast veruleikafjar, men sum kortini eru rokkin. Hann var maðurin, sum stóð fyri HM í kvinnuhondbólti. Saman við Anju Andersen bygdi hann upp á fýra ár Slagelse frá at vera eitt lið í næstbestu donsku deildini til at vera heimsins sterkasta lið í kvinnuhondbólti. Og saman við øðrum megnaði hann at savna ikki bara Herning og Ikast men at kalla alt Norðurjylland, so ein seriøsur avbjóðari til danska fótbóltstindin kundi skapast.

Og tað er júst slíkt víðskygni, sum skal til, um mørk skulu flytast. Summi hava hug til at siga, at tann, sum ikki fer upp um garðin, har hann er lægstur, er ikki heilt rættsiktaður. Eitt amerikanskt orðafelli sigur, at tú skalt leita eftir hægsta punktinum á garðinum, og síðani hoppa so alt tað, sum tú orkar.

Undir øllum umstøðum er einasta royndin, sum ikki miseydnast, tann, ið tú ongan tíð gert. Tað er kanska tryggari, men avgjørt ikki eins spennandi.

Kyndil-Neistin 20-26 (8-15):

# Neistin eigur Havnina

**Hóast Kyndil í løtum var væl við, so megnaðu tær ikki at taka stig frá bláu grannunum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Jórun Ludvig og liðfelagarnir royndu at trýsta, men tær megnaðu tó ikki at taka grannarnar úr Neistanum, sum framvegis elta fremstu liðini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Eftir at Kyndil í vár argaði Neistan fleiri ferðir á kvinnusíðuni, hevur myndin í ár verið tann meira vanda, har tær bláu hava havt munin í høvuðsstaðnum. Og í so máta var sunnudagurin einki undantak.

Kyndil var annars væl við fyrstu løtuna, tá tær hildu høvdið kalt í álopsspælinum, soleiðis at Neistin ikki slapp at renna frá teimum.

Um miðjan fyrra hálvleik skrædnaði tó, tá Kyndi leinki mál fekk í 10 minuttir, og eftir hetta kom ongan tíð nakar veruligur spenningur í dystin.

Kyndil megnaði tó at halda fast í mótstøðuni, soleiðis at munurin ikki øktist millu liðini, men nakrar trupulleikar hevði Neistin ikki av hesum.

Soleiðis er Kyndil framvegis stigaleyst í botninum á talvuni, meðan Neistin enn sum áður roynir at renna eftir VB og Stjørnuni.

## FAKTA um dystin

**Kyndil-Neistin 20-26 (8-15)**
**10 min:** 3-7
**20 min:** 6-12
**40 min:** 13-17
**50 min:** 16-22
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Jórun Ludvig 6, Halla Midjord 4, Jacklin Durhuus 3(1), Ása Christiansen 3, Rakul N. Joensen 2, Annika Poulsen 1, Linda Johannesen 1
**Neistin:** Trine Mayland 8(1), Nicoleta Radu Hansen 4, Annika Ljósstein 4(1), Heidi Maria Akselsen 3, Brindis Hjartadóttir 3, Rakul Augustinussen 2(1), Anja Heinadóttir 2
**Brotskøst:** Kyndil 3, Neistin 8
**Útvísingar:** Kyndil 3, Neistin 1
**Diskvalifikatión:** Kyndil 1 (3X2 minuttir)